# Lægsta tilboð ikki longur lægst

**Nú danska fyritøkan KB El-Teknik hevur kravt 1,75 milliónir krónur afturat fyri at gera el-arbeiðið í Vágatunnlinum liðugt, er tilboðið frá fyritøkuni við eitt vorðið eina millión dýrari enn næstlægsta tilboðið. – Broyttu fortreytirnar eru orsøkin til meirkostnaðin, og tí mugu vit góðtaka hetta, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin**



*Ein eykarokning upp á 1,75 milliónir krónur frá KB El-Teknik til P/F Vágatunnilin. Tað var úrslitið av fundinum partanna millum í einum arbeiðsskúri í Leynum týskvøldið. Meirkostnaðurin ger, at samlaða rokningin frá KB El-Teknik fer eina millión uppum næstlægsta tilboðið, sum P/F Vágatunnilin fekk uppá el-arbeiðið í undirsjóvartunnlinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

VÁGATUNNILIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tá tilboðini uppá el-arbeiðið og tað sonevnda SRO-arbeiðið (styring, regulering, overvågning) vóru latin upp á skrivstovuni hjá P/F Vágatunnilin á Skansavegi 7, tann 10.apríl í ár, hevði KB El-Teknik lægsta tilboðið. Danska fyritøkan bjóðaði sær til at gera el- og SRO-arbeiðið fyri á leið 12,2 milliónir krónur, ella 700.000 krónur lægri enn næstlægsta tilboðið, sum var frá P/F Eyðun Jespersen og felagnum Agder Energi Belysning. Hini bæði samtøkini, sum eisini vóru sloppin gjøgnum prekvalifiseringina og víðari til sjálva tilboðsgevingina, vóru P/F Højgaard & Schultz, sum bjóðaðu saman við El-talvuvirkinum í Gøtu og MT Højgaard Installation A/S. Fjórða tilboðið var frá ABB A/S og P/F El-Service

Úrslitið gjørdist sum kunnugt, at KB El-teknik fekk arbeiðið, og um hálvan august varð so smátt farið í gongd við el-arbeiðið í Vágatunnlinum. Men av tí at meira av vatni lak niður í tunnilin enn væntað, og tað tískil mátti leggjast meira av tekju upp undir loftið, slapp danska fyritøkan ikki framat til ásettu tíðina.

Eftir at leiðslan í P/F Vágatunnilin fyri viku síðan boðaði frá, at tunnilin kortini ikki kundi takast í nýtslu tann 26. november, varð fundur avtalaður millum Vágatunnilin, NCC og KB El-Teknik um, hvat nú skuldi henda. Semjan partanna millum bar í sær, at P/F Vágatunnilin skal gjalda KB El-Teknik 1,75 milliónir krónur afturat upprunaliga kostnaðinum fyri at gera arbeiðið liðugt, so tunnilin kann takast í nýtslu 10. desember. Samtíðis bar semjan, sum fekst í arbeiðsskúrinum í Leynum týskvøldið, ikki í sær nakra eykarokning frá NCC til P/F Vágatunnilin.

### Ikki longur bíligast

Við eykarokningini frá KB El-Teknik uppá 1,75 milliónir krónur kemur samlaða tilboðið frá donsku fyritøkuni upp á stívliga 14 milliónir krónur, ella eina millión hægri enn næstlægsta tilboðið, ið var latið upp tann 10. apríl.

Dávid Reinert Hansen váttar, at tilboðið, ið P/F Vágatunnilin tók av, nú ikki gjørdist bíligasta tilboðið kortini.

– Tilboðini uppá el- og SRO-arbeiðið vóru givin við teimum fortreytum, sum tá vóru galdandi. Síðan eru fortreytirnar broyttar, og tí meti eg tað vera skeivt at samanbera við upprunaligu tilboðini, nú arbeiðið er farið í gongd, sigur stjórin í P/F Vágatunnilin.

Spurdur, hvørjar broyttu fortreytirnar eru viðvíkjandi el-arbeiðinum, sum gera arbeiðið heilar 1,75 milliónir krónur dýrari, sammett við tilboðið, vísir Dávid Reinert Hansen á, at nú nýggj tíðarfreist er sett á, nær tunnilin skal takast í nýtslu, er neyðugt hjá el-fyritøkuni at skipa arbeiðið ørðvísi.

– KB El-Teknik hevur boðað frá, at teir, fyri at vera lidnir til ásetta dato, noyðast at hava fleiri mans í arbeiði – frá at vera umleið átta fara teir nú at vera 15 mans til arbeiðis fyri at fáa el-arbeiðið liðugt, sigur Dávid Reinert Hansen. Hann leggur afturat, at harumframt koma aðrar meirútreiðslur, ið KB El-Teknik sigur seg hava haft, av tí at fyritøkan ikki er sloppin framat arbeiðinum til ásettu tíðina.

Stjórin fyri P/F Vágatunnilin váttar, at arbeiðið, ið KB El-Teknik skal gera í Vágatunnlinum, er júst tað sama nú, sum tað upprunaliga var, tá tilboðini vóru latin inn. Hann sigur, at upprunaliga kravdi danska fyritøkan eina langt størri upphædd fyri at gera arbeiðið liðugt, men at partarnir síðan samdust um, at P/F Vágatunnilin skal gjalda 1,75 milliónir krónur afturat, fyri at fáa el-arbeiðið liðugt.

Við eitt sindur av høvuðrokning ber til at rokna seg fram til, at við eini meðal tímaløn uppá 400 krónur um tíman ber til at hava 15 mans í arbeiði í 292 arbeiðstímar, fyri tær 1,75 milliónir krónurnar, sum eykarokningin frá KB El-Teknik ljóðar uppá.

Dávid Reinert Hansen sigur seg duga at skilja, at við strammu tíðarætlanini, ið P/F Vágatunnilin hevur sett sær sjálvum fyri nær tunnilin skal lata upp, er vandi fyri, at tilboðsgevararnir kunnu útnytta støðuna til at trýsta prísin uppeftir.

– El-arbeiðið í tunnlinum er jú í gongd, og sum útgangsstøði hava vit tí alla tíðina roynt at fingið teir somu at gera arbeiðið liðugt. Skuldu vit nú fáa eina aðra fyritøku til at gera arbeiðið, so hevði tað bæði tikið longri tíð, og helst eisini kostað meira. Harumframt var vandi fyri eini møguligari rættarsak móti P/F Vágatunnilin, sum vit ikki kendu úrslitið av frammanundan.

Spurdur, hvørt P/F Vágatunnilin hevur tryggjað sær, at henda eykarokningin frá KB El-Teknik verður tann seinasta, sigur Dávid Reinert Hansen, at partarnir eru samdir um, at viðvíkjandi tí, sum er farið fram til dags dato, ber ikki til at koma afturumaftur. Skal ein eykarokning kunna leggjast á borðið afturat, so skal tað vera tí at fortreytirnar hetta til 10. desember broytast munandi, sigur stjórin í P/F Vágatunnilin.

# Fámæltur stjóri

**Knud Balle, stjóri í KB El-Teknik, hevur als ongan hug at gera viðmerkingar til mongu tíðindini um fyritøku hansara í seinastuni. – Vit arbeiða nógva staðni kring heimin, og okkara politikkur er at vit úttala okkum ikki alment um okkara fyritøku, sigur Knud Balle, sum ikki vil vísa aftur, at fyritøka hansara er komin til Føroya fyri at vera.**

VINNULÍV
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Í seinastuni hava spurnartekin verið sett við fleiri viðurskifti hjá donsku el-fyritøkuni KB El-Teknik. Hóast hetta, so hevur stjórin í KB El-Teknik ongan hug at gera viðmerkingar til nakað sum helst.

Í Sosialinum mikudagin varð víst á, at fyritøkan bara virkar sum ein postkassa-fyritøka í Føroyum, har Knud Balle sjálvur stendur skrásettur hjá Toll&Skatt sum búsitandi í Føroyum, hóast hann ongantíð er fluttur til landið. Hetta váttar føroyska Landsfólkayvirlitið.

Føroysk lóggáva krevur nevniliga, at allar útlendskar fyritøkur, sum selja vørur og tænastur, skulu vera MVG-skrásettar í landinum og hava eitt umboðsfólk her. Hjá føroyska Toll&Skatt er KB El-Teknik skrásett sum eitt einstaklingavirki, og umboðsmaðurin hjá fyritøkuni er Knud Balle, sum er skrásettur á eini adressu í høvuðsstaðnum.

Harumframt hevur verið víst á, at fyritøkan, sum hevur um hendi trý av teimum størstu el-arbeiðum í landinum, Kollafjord Pelagic, Landssjúkrahúsið og Vágatunnilin, í fleiri mánaðir hevur arbeitt uttan nakra løggilding. Í juni mánað fór maðurin, sum hevði um hendi løggildingina, og harvið eisini ábyrgdina av øllum arbeiðum hjá fyritøkuni í landinum, í annað starv. Men ikki fyrr enn 26.september varð ein annar maður, føroyingurin Thorvald Gaardlykke, sum hevur løggilding, settur í starv hjá KB El-Teknik, og tá varð eisini hansara løggilding flutt yvir í donsku fyritøkuna. Hetta merkir, at í tríggjar mánaðir arbeiddi fyritøkan uttan føroyska løggilding – ella við øðrum orðum: í tríggjar mánaðir hevði eingin persónur ábyrgdina av arbeiðunum hjá fyritøkuni í Føroyum.

### Ongar viðmerkingar

Sosialurin fekk fyrrapartin fríggjadagin orðið á stjóran í KB El-Teknik, Knud Balle, sum tá varð staddur á skrivstovu síni í danska býnum Ry. Knud Balle hevur ongar viðmerkingar til, hvørt hann nakrantíð er fluttur til Føroya. Hann vil hvørki vátta ella avsanna, at hann yvirfyri føroysku myndugleikunum hevur upplýst, at hann var búsitandi í Føroyum, hetta so at fyritøka hansara sleppur at virka í landinum. Knud Balle hevur annars bústað og adressu í Danmark.

Knud Balle kann hvørki vátta ella vísa aftur, at fyritøka hansara í fleiri mánaðir hevur arbeitt í Føroyum, uttan at løggildingin var í lagi.

– Eg havi ongar viðmerkingar til hasi viðurskiftini, sigur Knud Balle.

### Avtalan við P/F Vágatunnilin

Týskvøldið skrivaði Knud Balle undir avtalu við Dávid Reinert Hansen, stjóra í P/F Vágatunnilin. Ein avtala, sum skal tryggja, at el-arbeiðið verður gjørt liðugt, so undirsjóvartunnilin kann lata upp fyri ferðslu 10. desember. Fyri hetta fær KB El-Teknik 1,75 milliónir krónur afturat tí, sum fyritøkan bjóðaði, tá arbeiðið varð boðið út. Aðrastaðni í blaðnum vísir Dávid Reinert Hansen á, at neyðugt var við nýggjari avtalu, tí annað arbeiði í tunnlinum seinkaði el-arbeiðinum, so fólkið hjá KB El-Teknik ikki slapp framat til ásettu tíð.

– Grundarlagið undir okkara tilboði er munandi broytt nú. Vit mugu bæði leggja uppfyri spill-tíðini, tá vit ikki sluppu framat, umframt at vit nú skulu hava fleiri mans í arbeiði fyri at fáa el-arbeiðið liðugt til tann 10.desember, sigur Knud Balle. Hvussu nógvar mans talan er um, vil hann tó ikki siga.

Stjórin í P/F Vágatunnilin førir fram, at upprunaliga kravið frá KB El-Teknik til P/F Vágatunnilin var langt omanfyri tær 1,75 milliónirnar, sum fyritøkan nú hevur fingið afturat. Men Knud Balle ynskir ikki at gera viðmerkingar til upphæddina, og hvørji krøv, fyritøka hansara møguliga hevur sett.

Stjórin í KB El-Teknik sigur, at henda avtala, ið hann hevur gjørt við P/F Vágatunnilin, er bindandi, so leingi fortreytirnar fyri arbeiðinum ikki broytast. Hann sigur, at fyritøkan hevur gjørt eina avtalu um at gera el-arbeiðið liðugt, so tunnilin kann lata upp 10. desember, og tað ætla tey sær at halda.

### Føroyar áhugaverdur marknaður

Fyritøkan hjá Knud Balle hevur rættuliga fingið vind í seglini í Føroyum, og sum nevnt hevur hon um hendi stórarbeiði, bæði í Kollafirði, á Landssjúkrahúsinum og í Vágatunnlinum. Bara hesi bæði seinastu eru arbeiði fyri yvir 30 milliónir krónur. Knud Balle sigur, at stinga onnur arbeiði í Føroyum seg upp, sum kunnu tykjast áhugaverd fyri fyritøkuna, so ætla tey sær avgjørt at bjóða uppá arbeiðini. Hann metir ikki, at nógva umtalan av KB El-Teknik hevur skatt fyritøku hansara.

– Eg meti ikki, at umtalan hevur skatt okkum. Vit fylgja øllum lógum og reglugerðum, og vit eru kappingarfør, bæði í prísi og í dygd, sigur Knud Balle, stjóri í KB El-Teknik.



# Kristian Magnussen: Høgni Hoydal umboðar ikki mín vilja

**Embætisførslan hjá Høgna Hoydal minnir ikki sørt um valdsreingjan, og tað eigur Løgtingið ikki at kunna liva við, heldur Kristian Magnussen**

UTTANLANDS-SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*



*– Tað tykist sum um partapolitikkur er einasta orsøk til at Høgni Hoydal ætlar at forbjóða Elektron at samstarva við danskan stovn, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður*

– Tað tykist sum um at partapolitikkur er einasta orsøk til, at Høgni Hoydal ætlar at forbjóða Elektron at samstarva við ein tænastustovn í Danmark. Og tað er ikki ein saklig orsøk.

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, hevur nú reist tvídráttin ímillum Høgna Hoydal, landsstýrismann í lógarmálum og Elektron í Løgtinginum.

Hann hevur sett Høgna Hoydal nakrar skrivligar fyrispurningar um ætlanina hjá landsstýrismanninum at forbjóða Elektron at samstarva við danska tænastustovnin Pengeinstitutternes Betalingsservice, vanliga nevnt PBS.

Kristian Magnussen vil hava at vita, hvørjar sakligar orsøkir, Høgni Hoydal hevur fyri at forbjóða hesum samstarvi.

Hann hevur tískil sett Høgna Hoydal seks spurningar og teir eru:

1. Hvørji saklig atlit í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum metir landsstýrismaðurin seg hava, tá hann við nýggjari kunngerð ætlar at stegða Elektron í at samskifta við danskan tænastustovn?

2. Í hvønn mun metir landsstýrismaðurin, at lóggávan á teimum økjum, ið snúgva seg um viðgerð av persónsupplýsingum, ger rættarstøðuna hjá persónum verri í Danmark enn í Føroyum?

3. Hevur landsstýrismaðurin fingið viðmæli frá fyrisitingini til at gera nýggja kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond? og um so er, hvussu eru grundgevingarnar í viðmælinum?

4. Í hvønn mun forðar handilssáttmálin millum Føroyar op ES, at landsstýrismaðurin tekur atlit til, at føroyskar teldufyritøkur fáa handilsliga serstøðu í mun til ES-fyritøkur, og at EDV-førleiki verður varðveittur í Føroyum?

5. Hvørjar tankar hevur landsstýrismaðurin gjørt sær, um møguligt rættarmál verður avleiðing av fráboðaðu kunngerðini?

6. Hvørjar avleiðingar, metir landsstýrismaðurin, at fráboðaða kunngerðin kann hava fyri tær gjaldstænastur, ið føroyingum stendur í boði í dag?

### Umboðar ikki mín vilja

Kristian Magnussen vísir á tað drúgva orðaskiftið, sum hevur verið ímillum Elektron øðrumegin og landsstýrismannin í lógamálum hinumegin um samstarvið, sum Elektron hevur við PBS.

Elektron heldur uppá, at samstarvið við PBS er fult lógligt og víst verður á, at Dátueftirlitið, sum er hægsti myndugleiki á økinum, hevur givið loyvi til hetta samstarv.

– Landsstýrismaðurin metir ikki, at lógin heimilar slíkum virksemi, og hann hevur í sínari argumentasjón serliga víst til álitið, ið rættarnevndin læt Løgtinginum, tá lógin var til viðgerðar og var samtykt í Løgtinginum á vári 2001.

– Niðurstøðan hjá landsstýrismanninum er, at tað er Løgtingsins vilji, at slíkar upplýsingar, ið talan er um, ikki skulu av landinum, og at hann vil gera tað, ið er neyðugt fyri at steðga hesum virkseminum hjá Elektron.

Høgni Hoydal hevur tískil boðað frá, at hann ætlar at koma við nýggjari kunngerð, ið ger hetta púra greitt.

Kristian Magnussen sigur, at hann var ein av teimum, sum var til at samtykkja lógina um viðgerð av persónslýsingum.

– Og við hesum vil eg landsstýrismanninum frá, at hann ikki umboðar mín vilja í hesum máli.

Kristian Magnussen sigur, at eftir hansara tykki loyvir lógin, at upplýsingar kunnu flytast av landinum, um tað er sannlíkt, at lóggávan, í hesum førinum í Danmark, verjir einstaklingin líka væl sum føroysk lóggáva.

– Eg eri sannførdur um, at tað neyvan finst ein saklig grundgeving fyri at halda, at donsk lóggáva ikki tryggjar borgaran líka væl ella betur enn okkara egna lóggáva, tá talan er um at tryggja borgaran, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar.

Løgtingsmaðurin vísir á, at í endamálsorðingin í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum stendur at endamálið við lógini er at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá ið persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Tað merkir, at teir skulu verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku.

– Høvuðsendamálið við lógini er sostatt, at tryggja persónsvernd hins einstaka, og tí er hetta einasta sakliga atlitið, ið landsstýrismaðurin eigur at taka, tá ið støða skal takast til, hvat er loyvt ella ikki.

Kristian Magnussen sigur, at er grundgevingin hjá landsstýrismanninum, at verja Elektron og harvið føroysk arbeiðspláss og føroyska vitan, eru hetta ósaklig atlit, ið einki hava við persónsvernd hjá tí einstaka at gera.

– Tað margháttliga í hesum máli er, at Elektron metir seg kunna nýta avmarkaðu arbeiðsorku sína til aðrar átrokandi uppgávur enn hesa, ið teir kunnu útvega sær úr Danmark, og at stovnurin frábiður sær hesa, eftir mínum tykki, politisku uppíblanding frá landsstýrismanninum.

– Einasta atlitið, ið tykist vera hjá landsstýrismanninum, er tað partapolitiska, og hetta er ikki eitt sakligt atlit at taka og er ikki í samsvari við endamálsorðingina í lógini.

– Embætisførslan hjá landsstýrismanninum minnir ikki sørt um tað, sum við einum donskum orði verður nevnt »magtfordrejning«, og tað eigur Løgtingið ikki at kunna liva við, sigur Kristian Magnussen.

Sí eisini greinina »Med forlov«, sum Jørn Astrup Hansen, nevndarformaður í Elektron og stjóri í Føroya Banka, skrivar aðrastaðni í blaðnum.

# Sendu hjálp beinanveg

**Á alarmsentralinum vilja tey ikki vera við, at tey ikki tóku tað fyri fult, tá ið ein drongur bað um hjálp, eftir at ein seksæringur hevði siglt á land á Glyvursnesi**

ALARMSENTRALUR
*Áki Bertholdsen*



*Vit tóku tað fyri fult og sendu hjálp á staðið beinanvegin, tá ið seksæringurin av Argjum fór á land á Glyvursnesi týsnáttina, sigur politistøðin og vísir sostatt atfinningunum ímóti alarmsentralinum aftur*

– Tað er ikki rætt, at vit ikki tóku tað fyri fult..

Kristian Dahl á politistøðini í Havn, vísir aftur, at alarmsentralurin ikki tók 14 ára gamla Trygva Jacobsen fyri fult, tá ið hann ringdi og bað um hjálp, eftir at hann, sjálvur annar, var farin á land á Glyvursnesi við einum seksæringi týsnáttina.

Hann sigur, at tvørturímóti sendi alarmsentralurin hjálp á staðið beinanvegin.

Hann hevur sjálvur lurtað eftir bandupptøkum av tí, sum varð sagt, tá ið drongurin ringdi eftir hjálp.

– Sambandið var ógvuliga vánaligt, so tað er truppult at hoyra, hvat sagt verður. Í veruleikanum var talan um tríggjar samrøður, tvær á alarmsentralin og eina á politistøðina, so tvær fróir varð sambandið kvett.

Men um tað var kvett tí at drongurin legði hornið á, ella tí at signalið hvarv, veit hann ikki.

Kristian Dahl sigur, at tá ið drongurin ringdi triðju ferð, fekk hann at vita, at hjálp var á veg, tí politisturin, sum tók telefonina á alarmsentralinum, setti bjargingartiltak í verk beinanvegin.

Telefonin hjá alarmsentralinum og telefonin á politistøðini standa eisini á sama borðið, so tað er ikki so langt ímillum og oftast er tað sami politistur, sum svarar báðum telefonunum. Tó leggur hann afturat, at fyri at kunna veita so góða hjálp sum gjørligt, er tað neyðugt at fáa ymsar upplýsingar.

– Hjá tí, sum er í neyð, kann tíðin tykjast ómetaliga long, hóast talan bert er um nakrar fáar minuttir. Men hesir upplýsingar eru týdningarmiklir fyri at kunnu veita røttu hjálpina. Og tá ið sambandið er so vánaligt, sum tað var í hesum føri, ger tað eisini sítt til, at tað longri tíð at fáa teir røttu upplýsingarnar.

Men nú sigur drongurin, at hann varð spurdur um hann hevði stolið bátin. Er tað ein neyðugur upplýsingur fyri at kunna veita hjálp?

– Eg skal ikki siga, hvat varð spurt um og ikki í hesum føri. Men tað er altíð neyðugt at hava so fullfíggjaða mynd av støðuni sum gjørligt fyri at vita akkurát, hvat skal gerast, sigur Kristian Dahl.

Hann heldur tí, at alt fór fram, sum tað skuldi hesa náttina, seksæringurin av Argjum sigldi á land.